# BILAR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Infiniti luksusbilar til Evropa



*Næsta ár koma luksusbilarnir hjá Nissan, Infiniti, á evropeiska marknaðin*



*Infiniti eru flottir luksusbilar. Innan er alt leður og teak og annars alt ið hoyrir til ein slíkan bil*

**Næsta ár koma luksusbilarnir hjá Nissan, Infiniti, á evropeiska marknaðin. Talan er um væl útgjørdar luksusbilar í ymiskum støddum við bæði V6 og V8 motorum. Infiniti verður eitt bilmerki, sum vit eisini skulu venja okkum við**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í 2008 kemur eitt nýtt bilmerki at kappast á marknaðinum fyri luksusbilar í Evropa. Talan er um Infiniti, ið er luksus bilmerki hjá Nissan. Infiniti hava verið seldir í USA síðan 1989 og verða eisini seldir í Miðeystri og í Asia.

Eftir at japonsku bilverksmiðjurnar Honda og Toyota í 80-unum fingið sær síni egnu luksus bilmerkir við ávikavist Acura og Lexus, serliga ætlað til amerikanska marknaðin, komu Nissan í 1989 við sínum luksusbilmerki, ið fekk navnið Infiniti.

Infiniti hava ikki verið seldir í Evropa áður, men nú eru teir ávegis. Eftir ætlan koma teir til Evropa í 2008, og verða teir eisini seldir í Danmark og í Føroyum. Infiniti, ið verða gjørdir bæði í Japan og USA, eru flottir og væl útgjørdir luksusbilar við V6 og V8 motorum.



*M 45 er ein heilt nýggjur luksus sedan*



*Infiniti er luksus bilmerki hjá Nissan*



*Infiniti G 37 coupé*



*Infiniti G 35 Coupé*



*QX 56 er ein ovurstórur SUV við trimum røðum av setrum og V8 motori við yvir 300*